


# Renningin er tað fyrsta

**Sum vanligt, er Ólavsøkurenningin byrjanin til ítróttarliga partin av ólavsøkuni, samstundis sum hetta er tann síðsta av Grand Prix-kappingunum**

**Hilmar Jan Hansen**

Tey seinnu árini er ólavsøkan, ítróttarliga sæð, byrjað við ólavsøkukapprenningini, og í ár er heldur einki undantak. Týskvøldið klokkan 18 fer kappingin í gongd á Skálatrøð, og væntandi verður undirtøkan á leið tann sama, sum hon hevur verið tey seinnu árini.

– Tað hava verið úti við 300 rennarar við, og tað er líkasum eisini markið, tí rutan gevur ikki pláss fyri so nógvum aftrat. Hetta er blivin ein serlig kapping, tí hon er á ólavsøku, samstundis sum hetta jú er tann seinasta av Grand Prix-kappingunum, sigur formaðurin í Bragdinum, Fríðrikur Bláhamar.

– Akkurát sum í øðrum ítróttargreinum, er tað nakað serligt at vinna á ólavsøku, so gjarna leggja rennararnir nógv fyri. Hesa ferð kemur kanska onkur av okkara góðu kvinnuligu rennarum, sum eru niðri, upp til kappingina, so tað verður uppaftur meira spennandi har, enn tað kanska hevur verið.

### Bæði børn og vaksin

Kappast verður í ymsum bólkum hjá bæði vaksnum og børnum. Tey vaksnu renna fimm kilometrar, meðan teinarnir hjá størru børnunum er 1200 metrar og hjá teimum smærru 600 metrar. Runnið verður runt av Skálatrøð og út á Bakka, har vent verður, og so skal rennast rundan um handilin hjá Valdemar Lützen og aftur á málið, sum er á Skálatrøð.

– Øll árini hevur hetta verið ein fólkslig renning, so øll eru hjartaliga vælkomin, bæði vaksin og børn. Tíðirnar hjá teimum bestu liggja millum eitt korter og 20 minuttir, meðan nógvir av rennarunum hava tíðir, sum liggja um 25 minuttir, so hetta er avgjørt eisini ein áskoðaravinarlig kapping, sigur Fríðrikur Bláhamar.

Tilmeldingin verður á heimasíðuni www.renn.fo, og seinasta freist er mánakvøldið 27. juli. Teir rennarar, sum eru við í ólavsøkukapprenningini, skulu møta ein tíma undan kappingini at fáa startnummar.

# Tveir ólavsøkudystir

**Eingin steypafinala er á ólavsøku í ár, men kortini verða ikki færri enn tveir dystir av týdningi spældir í Gundadali á ólavsøku, tí bæði HB og B36 hava heimadyst í landskappingini**

**Hilmar Jan Hansen**

Seinnu árini hevur verið langt millum fótbóltsdystirnar hjá havnarfeløgunum á ólavsøku, ið hava nakað upp á seg. Fyrr plagdu HB og TB at spæla ein dyst og B36 og KÍ ein annan, men hóast hesir dystir vóru fastur siður í mong ár, eru teir ikki áskoðaramagnet longur, og tað er langt síðani, at nakar slíkur dystur hevur verið spældur.

Ein orsøk til tað hevur sjálvandi verið, at fleiri ferðir tey seinnu árini hevur finalan í kappingini um Løgmanssteypið verið á ólavsøku, men so verður ikki í ár. Í staðin er finalan farin norður til Klaksvíkar, har hon mestsum verður partur av summarfestivalinum.

Tað hevur so givið pláss fyri, at bæði HB og B36 kunnu spæla dystir, ið telja, tí í báðum førum verða spældir landskappingardystir. Í skrivandi løtu var ikki heilt greitt, hvør spældi nær, men nógv bendi á, at HB og B71 spældu ólavsøkuaftan og B36 og Víkingur ólavsøkudag.

Sum støðan er í landskappingini, hava báðir hesir dystir týdning, nú kappingin er gott og væl komin hálva leið. Dysturin millum HB og B71 er á pappírinum kanska ikki so spennandi, men HB er bara eitt stig aftan fyri oddaliðið, NSÍ, og B71, er bara trý stig framman fyri tey bæði liðini, sum eru niðan fyri niðurflytingarstrikuna. Tí hevur ein sigur stóran týdning hjá báðum pørtum.

Hin ólavsøkudysturin er millum B36 og Víking, sum liggja á ávikavist fimta og sætta plássi á stigatalvuni. B36 kann við sigri fara heili seks stig fram um Víking, sum hinvegin kann taka B36 aftur, eydnast teimum ljósabláu at vinna.